# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 1. november 2024 |
| Mál nr.: | 24/15575 |
| Málsviðgjørt: | JS/DH |
| Ummælistíð: | 18. sept. til 7. oktober 2024 |
| Eftirkannað: | 13. og 17. oktober 2024 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)**
(Eyka skatt á alifeløg)

**§ 1**

Í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023, sum broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 20. desember 2023 og løgtingslóg nr. 39 frá 16. mai 2024, verður aftan á § 30 b sett:

"**§ 30 c.** Inntøku frá vinnuligari alivinnu í Føroyum verður álagdur ein eyka skattur á 12% av skattskyldugari inntøku frá aling av fiski á sjónum.
*Stk. 2.* Til skattskyldugu inntøkuna sambært stk. 1 telist ikki inntøka frá m.ø.:
1) framleiðslu av fiskamjøli, lýsi og alifóðri,
2) smoltframleiðslu,
3) tøku,
4) tænastuskipum til aling,
5) kryvjing, og
6) virðisøking í framleiðsluni.
*Stk. 3.* Alifelag, sum hevur virksemi fevnt av hesi grein, skal geva upp skattskyldugu inntøkuna, sum eyka skattur skal gjaldast av, á sjálvuppgávu eftir vanligu reglunum í hesi løgtingslóg og skal gera serstaka uppgerð fyri skattskylduga inntøku, sum eyka skattur skal gjaldast av.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um serstøku uppgerðina, sum feløgini skulu lata inn.
*Stk. 5.* Eyka skatturin verður rindaður eins og partafelagsskatturin sambært § 81.
*Stk. 6.* Eyka skatturin fellur til landið."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2025.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Tað eydnaðist samgonguflokkunum at gera eina langtíðarsemju við Sambandsflokkin um eina nýggja gjaldskipan fyri alivinnuna, sí fylgiskjal 2.

Skipanin verður sett saman av ávikavist tøkugjaldi og einum eyka skatti á ein part av skattskyldugu inntøkuni hjá alifeløgunum. Fyrri partur av semjuni er útintur við løgtingslóg nr. 65 frá 30. mai 2024 um tøkugjald (LM-117/2023), sum kemur í gildi 1. januar 2025. Flokkarnir eru samdir um, at skipanin við eyka skattinum skal hava somu gildiskomu.

Semjupartarnir ynskja at broyta gjaldskipanina soleiðis, at hon í minni mun stýrir atferðini hjá alifeløgunum. Í uppskotinum verður ein eyka skattur lagdur á ein part av skattskyldugu inntøkuni hjá alifeløgunum, samstundis sum tøkugjaldið gerst ein lutfalsliga minni partur við tað, at hægsta stig nú er 7,5%.

Sambært avtalu millum semjupartarnar er tað bert skattskyldug inntøka av virkseminum frá aling av fiski á sjónum, sum fær álagdan eyka skatt. Onnur framleiðsla og virðisøking fær ikki álagdan eyka skatt. Við uppskotinum verður ein lutfalsliga størri partur av gjaldskipanini grundaður á skattliga úrslitið hjá alifeløgunum.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi lóg rinda feløg í alivinnuni vanligan partafelagsskatt og kapitalvinningsskatt á sama hátt og eftir somu treytum sum onnur feløg. Tó hava alifeløg serliga lagaligar treytir at draga ávísar útreiðslur frá sbrt. § 26, stk. 3 í skattalógini. Serligu treytirnar, sum komu í gildi í 2004, høvdu sum endamál at skapa alivinnuni, sum tá var í kreppu, betri karmar at virka undir.

Tøkugjaldið, sum alifeløgunum er álagt at gjalda, verður ikki roknað sum ein skattur, men er heldur eitt nýtslugjald, sum landsmyndugleikar áleggja fyri rættin at gagnnýta føroysku aliøkini.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Politisk semja er gjørd millum samgonguflokkarnar og Sambandsflokkin um eina endurskoðaða skipan fyri gjøld frá alivinnuni. Í semjuskjalinum frá 26. mars 2024 eru partarnir komnir ásamt um at fremja eina tvíliðaða gjaldskipan fyri alivinnuna, sum er sett saman av tøkugjaldi og einum eyka skatti.

Semja er um, at skipanin í minst møguligan mun skal stýra atferðini hjá vinnuni, tá umræður, hvussu virksemið verður lagt til rættis, og at skipanin skal vera so umsitingarliga einføld og gjøgnumskygd sum til ber.

Fyrri partur av tvíliðaðu gjaldskipanini er útintur við uppskoti til løgtingslóg um tøkugjald (LM-117/2023), sum m.a. tekur burtur ovastu stigini í tøkugjaldsstiganum.

Við hesum lógaruppskoti verður skotið upp, at alifeløgini gjalda ein eyka skatt á 12% av tí partinum av skattskyldugu inntøkuni, sum stavar frá sjógvaling.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Við lógaruppskotinum vónar landsstýrisfólkið at betra um karmarnar, ið vinnan hevur at virka undir, samstundis sum eitt munandi, men rímiligt gjald verður rindað fyri rættin at ala á føroysku firðunum.

Gjaldið, sum rindað verður fyri rættin at ala á føroysku firðunum, verður sett saman av tøkugjaldi og einum eyka skatti á tann partin av skattskyldugu inntøkuni, sum stavar frá sjógvaling.

*Tilfeingis/loyvisskattur 2011-2015*

Líknandi lóggáva var galdandi árini 2011 til 2015.

Við løgtingslóg nr. 133 frá 28. desember 2010 varð nýggj § 30 b sett í skattalógina, sum álegði inntøku frá fiski- og alivinnu ein tilfeingis/loyvisskatt á 2,5% av skattskyldugari inntøku, hægri enn 1.000.000 kr. Í serligu viðmerkingunum stendur, at sum inntøka frá alivinnu er at rokna inntøka, sum stavar frá smolti umframt virksemi beinleiðis at ala fisk á sjónum. Í skattarokn skapinum hjá feløgum, sum høvdu inntøku frá fiski- og alivinnu, skuldi serstøk uppgerð gerast.

TAKS upplýsir, at í serstøku skattauppgerðini, sum varð nýtt árini 2011-2015, varð skattskylduga inntøkan skilmarkað á sama hátt sum fyri partafelagsskatt. Heimildin at áseta nærri reglur í kunngerð varð ikki nýtt. Talan var sostatt, í roynd og veru, um ein eyka partafelagsskatt til tey partafeløg, sum høvdu beinleiðis inntøku frá fiski- og alivinnu. Við tí virksemi, sum tá var í alivinnuni, hevur tað helst ikki verið mett neyðugt at skilmarka inntøku, sum stavar frá smolti og frá beinleiðis at ala fisk á sjónum, frá aðrari inntøku. Eyka skatturin á alivinnuna varð settur úr gildi frá og við inntøkuárinum 2014, og eitt tøkugjald varð sett ístaðin.

Semjuskjalið frá 26. mars 2024 nýtir í høvuðsheitinum somu skilmarking av tí inntøku, sum er fevnd av eyka skattinum, sum tann, ið varð nýtt til eyka skattin á alivinnuna árini 2011-2013.

Stór menning hevur verið í alivinnuni síðan tilfeingis/loyvisskattur seinast varð lagdur á alifyrtøkurnar, og feløgini hava ment annað virksemi, og fleiri lið eru í virðisketuni.

Í semjuskjalinum er tað ein greið fortreyt, at bert inntøku frá ávísum parti av virkseminum verður álagdur ein eyka skattur.

Virksemið frá sjógvaling er fevnt av eyka skattinum, meðan inntøka, sum stavar frá framleiðslu áðrenn sjógvaling, ikki er fevnd eyka skattinum, t.d. framleiðsla av fiskamjøli og smoltframleiðsla. Inntøku, sum stavar frá virksemi eftir sjógvaling, t.d. tøku, tænastuskipum, kryvjing og virðisøking, verður heldur ikki álagdur eyka skattur.

*Skattaskipanir í øðrum londum*

Ymiskar skipanir eru, sum leggja serligan skatt á ávísar vinnur. Noreg hevur lagt ein tilfeingisskatt á sjógvaling, ið verður útroknaður við støði í sonevnda yvirnormala vinninginum. Í hesi skipanini er neyðugt at skilmarka inntøku frá sjógvaling frá aðrari inntøku hjá feløgunum. Semja er um, at talan er um eina samansetta skipan, sum krevur nógva fyrisiting og eftirlit.

Fíggjarmálaráðið er ikki kunnugt við skattaskipanir í øðrum londum, sum leggja eyka skatt á *skattskylduga inntøka* frá ávísum liðum í eini samanhangandi virðisketu hjá feløgum í eini vinnu. Fleiri lond (t.d. Holland) leggja stigvaksandi skatt á feløg sum amboð at skatta inntøkur oman fyri eitt ásett mark, men ikki fyri ávís lið í eini virðisketu.

*Skattskylduga inntøkan*
Lógaruppskotið tekur støði í verandi skipan við partafelagsskatti, og leggur seg tætt at tí skipan, sum varð nýtt fyri alifeløgini árini 2011-2014, við ávísum tillagingum.

Ásett verður, at eyka skattur verður lagdur á inntøku, sum stavar frá aling av fiski á sjónum.

Ásett verður somuleiðis, at til skattskyldugu inntøkuna telist ikki inntøka frá m.ø.:
1) framleiðslu av fiskamjøli, lýsi og alifóðri,
2) smoltframleiðslu,
3) tøku,
4) tænastuskipum til aling,
5) kryvjing, og
6) virðisøking í framleiðsluni (VAP).

Ásetingin tilskilar inntøku frá virksemi, sum fellur uttan fyri skattskyldugu inntøkuna. Endamálið við ásetingini er at avmarka møgulig tulkingarivamál. Nevndu dømini viðgera ikki út í æsir, hvør inntøka fellur uttan fyri eyka skattin.

*Vansar*
Loysnin, sum verður skotin upp, er ikki uttan vansar. Ein skipan, sum leggur hægri skatt á ávíst vinnuligt virksemi, víkur frá sonevndu meginregluni um skattligan neutralitet og eggjar til skattahugsan, t.d. at áseta prís í handli millum feløg í samtaki, sum víkur frá tí prísi, ið vanliga verður ásettur millum óheftar partar. Eisini kann tað ávirka, hvussu t.d. kapitalkostnaður verður skipaður. Hetta eru væl kendar avbjóðingar innan t.d. skatting av samtøkum, serliga altjóða.

*Landøkisgrundregla*
Bert vinnulig alivinna í Føroyum er fevnd av eyka skattinum sbrt. stk. 1. Hevur alifelag virksemi uttanlands, er tað ikki fevnt av eyka skattinum.

*Skattauppgerðin*
Lógaruppskotið áleggur alifeløgum at gera serstaka skattauppgerð.

Skotið verður upp at heimila landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur viðvíkjandi serstøku skattauppgerðini. Tað verður neyðugt at greina nøkur viðurskifti nærri í kunngerð, t.d. um krøv til uppseting og møguliga um návgreining av tí inntøku, sum verður áløgd eyka skattin.

§ 30 c, stk. 1 nevnir tað virksemið, sum verður álagt eyka skatt, og í stk. 2 eru dømi nevnd, sum lýsa, hvat ikki er fevnt av eyka skattinum.

Um royndirnar við at gera serstaka skattauppgerð vísa, at tørvur er á at skilmarka markið millum § 30 c, stk. 1 og 2 meira neyvt, verður hetta ásett í kunngerð.

*Samanspæl við partafelagsskattin*
Talan er um ein eyka skatt, ið verður álagdur umframt partafelagsskattin. Eyka skatturin ávirkar ikki partafelagsskattin, ið skal gerast upp eins og higartil.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið er sent til ummælis á hoyringarportalinum og er harumframt sent til Havbúnaðarfelagið, Mowi, Luna, Bakkafrost, Felagið Føroyskir Grannskoðarar og TAKS.

Uppskotið varð lagt til hoyringar 18. september 2024. Freistin at koma við viðmerkingum var 30. september 2024. Hoyringarpartarnir vístu á, at freistin at svara var ov stutt. Fíggjarmálaráðið longdi freistina til 7. oktober 2024. Tað var ikki møguligt at geva longri freist, um broytingin skal leggjast fyri Løgtingið í heyst og hava gildi frá 1. januar 2025 sum avtalað millum semjupartarnar.

Hoyringarsvar eru komin frá:

- Havbúnaðarfelagnum
- Bakkafrosti
- Felagnum Føroyskir Grannskoðarar og
- TAKS

Ummælisskjal og ummæli eru løgd við sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Inntøkan frá eyka skattinum er treytað av úrslitinum í vinnuni. Árligi eyka skatturin verður mettur at liggja um 80-100 mió. kr. Talan er um varisliga meting. Tað er ikki møguligt at fáa neyv tøl fyri úrslitið frá sjógvaling hjá øllum alifeløgunum fyri eitt longri tíðarskeið, og tí byggir inntøkumetingin í ávísan mun á metingar frá vinnuni. Úrtøkan frá sjógvaling fylgir marknaðargongdini, og tí kann roknast við, at inntøkan, alt annað líka, fer at sveiggja meira frá ári til ár, enn samlaða skattskylduga inntøkan hjá alifeløgunum.

Skipanin fyri gjøld frá alivinnuni er sett saman av tøkugjaldi og eyka skatti á ein part av skattskyldugu inntøkuni. Tøkugjaldið minkar sannlíkt frá 2025, men eyka skatturin, ið verður álagdur fyri skattaárið 2025, verður goldin í 2026. Tískil má roknast við minni inntøku til landskassan í 2025. Frá 2026 skulu alifeløgini gjalda tøkugjald og eyka skatt. Nærri greining av væntaðari inntøku frá tøkugjaldi stendur í uppskoti til løgtingslóg um tøkugjald (LM-117/2023 s. 13).

Í semjuskjalinum stendur, at skipanin, sum skotin verður upp, krevur at brúka fremstu serfrøði og eftirlitsskipanir og at hetta verður tryggjað við neyðugari fígging og umsitingarligari orku.

Fíggjarmálaráðið metir, at neyðugt verður at seta starvsfólk at umsita og hava eftirlit við skipanini; millum annað verður neyðugt at styrkja eftirlitið við transfer pricing – t.e. í handilsligum ella fíggjarligum viðurskiftum millum partar í áhugafelagsskapi, eisini hóast talan er um innlendis viðurskifti.

Eyka skatturin fellur til landið. Tøkugjaldið kann sambært skattalógini § 33, nr. 18 dragast frá skattskyldugu inntøkuni, og eyka skatturin ávirkar, alt annað líka, ikki inntøkurnar hjá kommununum.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Við lógaruppskotinum fær TAKS eyka skattauppgerðir fyri alifeløgini. Neyðugt verður at seta fólk at umsita og hava eftirlit við skipanini; millum annað verður neyðugt at styrkja eftirlitið við transfer pricing millum feløg innanlands.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Alifeløgini verða ávirkað av uppskotinum. Alifeløgunum verður álagdur ein eyka skattur á skattskylduga inntøku frá sjógvaling.

Eyka skatturin krevur, at alifeløgini í sínum skipanum gera skrásetingar, sum eru neyðugar fyri at gera upp tann partin av skattskyldugu inntøkuni, ið fær álagdan eyka skattin. Eyka skatturin verður bert lagdur á skattskylduga inntøka frá sjógvaling. Mett verður, at tað er lutfalsliga einfalt at avmarka og umsita.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Ongin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Ongin viðkomandi tvørgangandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið verður ikki mett at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv. Galdandi reglur í skattalógini hesum viðvíkjandi fevna somuleiðis um eyka skattin.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Talan er um eitt skattauppskot.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur alifeløgunum eina skyldu at lata inn serstaka uppgerð í skattaroknskapinum. Uppgerðin verður latin inn saman við sjálvuppgávuni. Neyðugt er við serstakari uppgerð, tí eyka skatturin verður bert lagdur á ein part av skattskyldugu inntøkuni.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Í § 30 c, stk. 4 verður heimilað landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um serstøku skattauppgerðina. Tað verður neyðugt at greina nøkur viðurskifti nærri í kunngerð, t.d. um krøv til uppseting og møguliga um nágreining av tí inntøku, sum verður áløgd eyka skattin.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | [redacted] | | Nei | Nei | [redacted] |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
*Til stk. 1*
Eyka skatturin ávirkar ikki partafelagsskattin, ið skal gerast upp eins og higartil. Partafelagsskatturin skal sostatt ikki dragast frá í sambandi við uppgerð av eyka skattinum, mótvegis tøkugjaldi, ið verður roknað sum ein kostnaður.

Alifeløgunum verður við uppskotinum álagdur ein eyka skattur á ein part av skattskyldugu inntøkuni. Skattskylduga inntøkan verður gjørd upp á sama hátt sum fyri partafelagsskatt, tó avmarkað til skattskylduga inntøku frá aling av fiski á sjónum. Tað vil siga, at t.d. møguligt undirskot frá framleiðslu, sum ikki er fevnd av eyka skattinum, t.d. fóðurframleiðsla og virðisøking, kann ikki dragast frá.

Galdandi lóggáva um aling hevur greiðar ásetingar um, hvør kann reka vinnuliga alivinnu, og neyðugt er tí ikki at hava serstaka áseting í skattalógini um, hvørji feløg eru fevnd at eyka skattinum (subjektiv skattskylda).

Inntøkuhugtakið (fæbundna skattskyldan) verður í høvuðsheitinum ásett eftir somu skilmarking sum varð nýtt í løgtingslóg nr. 133 frá 28. desember 2010, tá eyka skattur varð lagdur á alivinnuna árini 2011-2013.

Bert skattskyldug inntøka frá vinnuligari alivinnu í Føroyum er fevnd av eyka skattinum. Í føroysku skattalógini er meginreglan, at alt tað, sum hin skattskyldugi í inntøkuárinum hevur lagt inn, verður roknað sum skattskyldug inntøka, uttan mun til um inntøkan stavar úr Føroyum ella ikki (altjóðainntøkumeginreglan í § 25). Tí verður ásett í stk. 1, at bert inntøku frá vinnuligari alivinnu í Føroyum verður álagdur eyka skattur.

*Til stk. 2*
Endamálið við ásetingini er at avmarka skilliga, hvat virksemi ikki er fevnt av eyka skattinum. Ásetingin lýsir ikki út í æsir, hvat er undantikið.

*Til stk. 3*
Alifeløgum verður álagt at geva upp skattskyldugu inntøkuna, sum eyka skattur skal gjaldast av, á sjálvuppgávu eftir vanligu reglunum í skattalógini umframt at gera serstaka uppgerð fyri skattskylduga inntøku, sum eyka skattur skal gjaldast av.

*Til stk. 4*
Heimild at áseta nærri reglur fyri uppseting o.a. av serstøku uppgerðini. Møguliga verður neyðugt við nærri ásetingum um skilmarkan av tí inntøku, sum fær álagdan eyka skattin.

*Til stk. 5*
Eyka skatturin verður rindaður eins og partafelagsskatturin sambært § 81; t.v.s. at skatturin fellur til gjaldingar í 3 gjøldum, 1. oktober, 1. november og 1. desember við gjaldfreist til 20. í mánaðinum. Ásetingarnar um at gjalda rættstundis, um rentu o.s.fr. eru tær somu sum fyri partafelagsskattin.

*Til stk. 6*
Eyka skatturin fellur til landið.

**Til § 2**
Eftir uppskotinum skal lógin fáa gildi frá 1. januar 2025 eins og løgtingslóg um tøkugjald (LM-117/2023).

Fíggjarmálaráðið, 1. november 2024

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Semjuskjal: Langtíðarsemja um tvíliðaða gjaldsskipan fyri alivinnuna
Fylgiskjal 3: Ummælisskjal
Fylgiskjal 4: Havbúnaðarfelagið
Fylgiskjal 5: Bakkafrost
Fylgiskjal 6: Felagið Føroyskir Grannskoðarar
Fylgiskjal 7: TAKS